# Hetland er

Tað hevur verið ein risa avbjóðing fyri fyrireikararnar av Oyggjaleikunum at fáa alt at vera klárt, tá ið innrásin av umleið 3000 fólk byrjar leygardagin. Fyrireikingarnar hava kostað umleið 55 milliónir krónur, men nú leikirnir skulu setast í Lerwick leygarkvøldið, er alt til reiðar



OYGGJALEIKIR

*Pete Bevington,*
*Shetland News Agency*

Tey siga, at hetta verður størri enn olympisku vetrarleikirnir, sum er størsta ítróttarhending, sum nakrantíð er farin fram í Skotlandi... og tað hendir í Hetlandi, har 22.000 fólk búgva.

Smáu oyggjarnar, sum liggja á gáttini til Norðsjógvin, hava ongantíð upplivað nakað líknandi. Næstan 3000 fólk koma til Hetlands at vera í eina viku, og har vera tey við í eini harðari og tættari kapping á breytum, vøllum og vegum.

Oyggjaleikirnir 2005 eru ein fyriskipanarlig marra. Ongantíð í søguna hjá leikunum hevur eitt minni land enn Hetland verið vertur, og sjáldan hevur vertsoyggin ligið so langt burturi frá øllum hinum oyggjunum.

Men Hetland hevur leingi havt ambitiónir um at hýsa Oyggjaleikunum, har 24 oyggjar vera við, tí Hetlandi hevur altíð verið við í hesum leikum. Norðasti parturin av Bretlandi hevði eitt lið við til teir allarfyrstu Oyggjaleikirnar í 1985, og síðani hevur Hetlandi eisini verið við í øllum leikunum.

## Góðar umstøður til ítrótt

Oljuríkidømið hjá Hetlandi, sum verður vunnið burtur úr Sullom Voe Terminal, har næstan helvtin av oljuni og gassunum hjá Bretlandi í Norðsjónum er at finna, hevur verið við til at gjalda fyri sera góðar ítróttar- og frítíðar umstøður í Hetlandi. Og tað er ikki frítt, at aðrir partar av Bretlandi øvunda hetlendingum fyri teirra umstøður.

Allir partar av Hetlandi hava sín egna frítíðardepil við svimjihyli – eisini tríggjar oyggjar, har fólkatalið liggur um tey 1000.

Í Lerwick, høvuðsstaðnum í Heltandi, er risastóra Clickimin Leisure Complex, sum liggur við eitt vatn og 2000 ára gamla Pictish fortið.

The Clickimin verður eitt slag av miðdepli fyri Oyggjaleikirnar í Hetlandi. Har verður tað, at leikirnir verða settir leygardagin. Tá vera øll ítróttafólkini til staðar og eisini fyrsti ráðharrin í Skotlandi, Jack McConnell. Clickimin hevur ein svimjihyl við altjóða støði, nýggjan squash-vøll, bowling-breytir, innandura høll og eina rennibreyt, sum nýliga er útbygd til Oyggjaleikirnirnar fyri meira enn 10 milliónir krónur.

Aðrir fasilitetir eru eisini betraðir til stóra dagin. Hetlandska stjórnarráðið hevur brúkt umleið 55 milliónir krónur til fyrireika Oyggjaleikirnar, og tað verður sagt, at alt hetta fyrst og fremst verður gjørt fyri lokala fólkið. Ein kanning hjá lokalum ráðgevum vil verða við, at Hetland fer at vinna einar 130 milliónir krónur burtur úr leikunum, hóast tað ikki varð sagt, hvussu tað skal gerast.

Uttan mun til hetta, verður Hetland í einum altjóða ljósi í eina heila viku millum 9. og 15. juli, tá 1800 ítróttarfólk úr 24 oyggjum fara at kappast í 15 ymiskum ítróttargreinum kring alt Hetland.

## Vit eru til reiðar

Maðurin í miðdeplinum, nú Oyggjaleikirnir verða hildnir í Heltandi, er Gary Jakeman, sum longu í 2002 var settur at stíla fyri leikunum. Tann krúllutu ítróttaráhugaði maðurin var við í leiðsluni av Oyggjaleikunum í 2001, tá ið teir vóru hildnir á hansara føðioyggj, Isle of Man. Hetta árið var Hetland eisini valt at hýsa leikunum í 2005.

Fýra ár eftir leikirnar á Isle of



*– Oyggjaleikirnir fara at geva hetlendingum eina uppliving – ikki bara í eina viku – men fyri lívið, sigur Gary Jakeman, sum stendur á odda fyri Oyggjaleikunum í Hetlandi. Hann hevur arbeitt í fýra ár við at fáa alt klárt til stóra dagin leygardagin, og tað hevur eydnast*



*Luttakarar og áskoðarar kunnu eisini uppliva list, náttúru og annað í Hetlandi, og fyrir við sær, at fólk vitja aftur í Hetlandi seinni*